# Bara ikki í Havn…

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



**Hevði bara ein einasta saklig grundgeving verið fyri, at nýggja Heilsutrygd skal vera í Klaksvík, hevði einki meira verið at sagt um tað. Men eingin slík grundgeving er, og aftur er prógvað, at heilaga grøvin er væl vard, verða stovnar lagdir alla aðrastaðni!**

Gamla orðatakið um, at nýggir kustar feia best, stendur enn eina ferð fyri falli. Nú tað var nýggjur landsstýrismaður, ið skuldi taka støðu til, hvar nýggja Heilsutrygd skuldi vera, var væntandi, at hann ikki datt í somu grøv sum fleiri av teimum royndaru, ið fyrst og fremst royna at tryggja sínar egnu heimsrustir, tá stovnar skulu hava bústað.

Men eisini hesin nýggi datt í grøvina, tí enn hevur hann ikki lagt fram eina einastu sakligu grund fyri, at Heilsutrygd júst húsast best í Klaksvík. Nakrar grundgevingar eru nevndar, men tær eru als ikki sakligar – og í besta føri sera tunnar. Hvørki fakligar, fíggjarligar ella vanliga rationellar grundgevingar eru komnar fram, men bert slíkar, ið mest líkjast verju av tilvildarligum avgerðum!

Sostatt bendir einki á, at landsstýrið enn hevur sæð skriftina á vegginum, men bara roynir at fortelja øðrum, hvussu landsins ognir verða best røktar og vardar – uttan sjálvt at vita ella vísa, hvat tað merkir. Vit hava ferð eftir ferð sæð, hvussu milliónir oman á milliónir verða blástar upp í luftina, tí nú skal nakað nýtt og øðrvísi roynast, og so er eisini hesa ferð. Her er einki nýtt!

**Haltar allar vegir**
Landsstýrismaðurin hevur brúkt sum grundgeving, at Klaksvík er eitt upplagt val, tí har er stutt til bæði apotek og sjúkrahús. Tann treytin verður eisini uppfylt í Havn og á Tvøroyri, men tó hevur ongantíð verið ætlað annað, enn at Heilsutrygd skuldi til Klaksvíkar. Og hvat ólukkan hava forrestin apotek og sjúkrahús við tað at gera, hvar Heilsutrygd skal húsast?

Í Klaksvík skal Heilsutrygd halda til í leigaðum hølum, so tí vita vit longu nú, at leiguútreiðslur verða av stovninum. Vildi landsstýrismaðurin víst samfelagssinni og spart eitt sindur, kundi hann í staðin valt Havnina, Fuglafjørð ella Tvøroyri, tí har eiga sjúkrakassarnir longu høli. Og har hevði verið klárt at flutt inn beinanvegin – uttan eina krónu í leiguútreiðslu!

Teir 11 sjúkrakassarnir hava tilsamans havt smá 15 ársverk, men nú skal alt landið avgreiðast av teimum báðum starvsfólkunum, sum frammanundan eru í starvi í Klaksvík – og landsstýrismaðurin sigur, at starvsfólk hjá Heilsumálaráðnum skulu hjálpa til at byrja við. Álvaratos, hava tey ikki annað at takast við í Heilsumálaráðnum, enn at hjálpa landsstýrismanninum at føra lokalpolitikk við Heilsutrygd, tí landsstýrismaðurin hevur gloymt at hugsa seg um, áðrenn hann í óðum verkum hevur lagt stovnin í Klaksvík? Og hvat við hinum 13 fólkunum, sum nú missa síni størv, tey hevur landsstýrismaðurin enn ikki borið upp á tungu.

Í nýggjársrøðu síni til Føroya fólk sigur løgmaður, at vit nú fara at skriva nýggjan kapitul í heilsusøgu Føroya, tá nýggja skipan við almannari heilsutrygd kemur í gildi. Skipanin er samhaldsføst og ger umsitingina smidligari og bíligari – gamaní, men hví so ikki taka støði í tí. Hví ikki heldur gera brúk av fleiri av teimum, ið gjøgnum árini hava vunnið sær drúgvar royndir á økinum í teimum 11 sjúkrakassunum, ið hava verið frammanundan? Her sær svart út við fakliga grundarlagnum, ið ofta er tað fyrsta, ið verður ofrað, tá stovnar fyri ein og hvønn prís skulu leggjast á persónliga heimabeitinum hjá avvarðandi landsstýrismanni. Her er alt sum fyrr!

**Órógvandi grundgevingar**
Tað er veruliga spell at síggja, at vit ikki eru komin longur, tí hetta er eitt klassadømi um, hvussu landsstýrið arbeiðir við bindi fyri eyguni. Grundgevingarnar eru ongar, men kortini ber til hjá einum landsstýrismanni at trumfa sítt ígjøgnum – kosta, hvat tað kosta vil! At tað í síðsta enda óivað kostar meira, at fakliga grundarlagið kanska má leggjast heldur lægri, at stovnurin helst ikki virkar optimalt – tað hevur minni at siga, bara yvirskipaða málið verður fylgt. Eykakostnaðurin fyri at flyta Strandfaraskip Landsins er eitt talan dømi.

At billa sær inn, at almennir stovnar skulu seta gongd á í útjaðaranum, og at teimum á baki kemur óivað betur vinnulív, mentanarlív og alt møguligt annað, er alt ein stór misskiljing, tí sum oftast er náttúrliga gongdin júst tann øvugta. Men tað hevur einki at siga, nú tað er blivið hægsti móti at fáa tømt miðstaðarøkið fyri almennar stovnar – sjálvt um tað ikki virkar.

Landsstýrismaðurin kundi víst seg sum undangongumann, hevði hann valt at hugt at heildini, heldur enn bara at fylgt lokalpatriotiskum áhugamálum. Hann kundi gingið undan, um hann tók tað besta frá fyrrverandi sjúkrakassunum og á fíggjarliga skynsaman hátt gav Heilsutrygd karmar, ið vóru uttan eykaútreiðslur. Men hann valdi heldur at ganga í fótasporunum hjá teimum, ið halda tað geva besta úrslit, at almennir stovnar verða spjaddir í so nógvar ættir sum gjørligt, hetta hósat at løgmaður í nýggjársrøðuni slær fast, at kravið fyri breiðum semjum at røkka settum málum er at tora at hava felags langtíðarmál og seta egnu áhugamál til viks fyri at tæna landi og fólki.

Hetta er tíverri reglan, heldur enn undantakið, og tí mugu vit enn eina ferð ásanna, at visjónir ikki er sterkasta síðan hjá landsstýrinum. Tað snýr seg tíverri framvegis um rossahandlar og egin áhugamál, har órógvandi grundgevingar ongantíð koma upp í part, og tí liggur landið vælsaktans eisini, sum tað liggur! Skammið tykkum!

# Umsíðir ein oddagrein, ið gnævar undan rúgvuni

TÓRBJØRN JACOBSEN



Blaðstýrarin á Sosialinum, Jan Müller, tykist hava fingið rætta beinið út av songarstokkinum, táið tað lýsti fyri degi í gjáramorgunin. Við væl spískaðum blýanti greinar hann ein av trupulleikunum, sum hetta samfelagið er við at hoykna undir ella undan. Bólgnandi umsitingina, ið er farin at líkjast alt meiri yvirísingini umborð í Torkeli Mána á Ný Funnalandsmiðum í fimtiárunum, táið teir brendu gálgarnar av honum við skeribrennara, fyri at fáa kjølfestuna aftur. Tað var um reppið, at teir hóraðu undan, operatiónin eydnaðist tó hesum djørvu valamonnum, og allir bóru boðini.

Aðalráðini eru nú til umrøðu, og gitt verður, hví rúgvan bara rúmkast. Nevnt verður, at løgmaður, fíggjarmálaráðharrin og vinnumálaráðharrin hava róð framundir, at talið verður skert, helst niður í seks aðalráð. Teir hava valdið til at gera tað, á sama hátt sum teir høvdu valdið til at seta tey níggju ráðini, táið seinra syftan av eini ABC-samgongu varð skipað, fyri hálvum øðrum ári síðani. Ynskidreymurin hjá blaðstýraranum um, at hendan samgongan fer at gera broytingina, er í bláoygdara lagi. Ein samgonga, ið ikki hongur saman av politiskum hugsjónum, visiónum og málum, hon hongur hinvegin saman í eini ísakaldari valdsins terrorjavnvág, har tað snýr seg um at býta á skinninum við politiskum taburettum og positioneringum.

Tað broytir onki um, at hava ein løgmann, sum á Rás2 hendan dagin, las alt idékatalogi hjá Tjóðveldinum upp, frá einum fíggjarlógaráliti, sum um, at hetta varð kósin, ið samgongan nú fór at stevna eftir. Bágin er, at onki hendir, bremsurnar eru sleptar, spitarin frystur og bíða verður bara eftir ørandi sjónini - uppganginum frá kølbláa havinum, táið upsin verður slept.

Talið av aðalráðum er úrslitið av eini politiskari kabalu. Ætlanin er bara kvantitativ, kvalitativa hugtakið er ikki komið monnum til hugs yvirhøvur. Blaðstýrarin ilskast serliga um nýskipaða ráðið í uttanríkismálum. Hetta var hugsað sum eitt týðandi lið í skipanini av føroyska statinum. Við negativa tjóðskaparliga ambitiónsniveau´num hjá hesi samgonguni, um ævinligt framhaldandi danskt hjálandastøði, er nýggja ráðið meiningsleyst, serliga táið vit sita eftir við einum skralltómum løgmansembæti. Hartil eru fólkafloksmenn somikið væl organiseraðir og mæltir fyri munni, at tørvur skuldi ikki verið á einum almennum propagandaministerium, fyri hálvthundrað milliónur krónur um árið, fyri at halda teirra hjólum rullandi.

Tað finst bara ein møguleiki fyri at broyta umrødda mál, og tað er at gera neyðugu ásetingarnar í Stýrisskipan Føroya. Sjálvur skrivaði eg eitt uppskot um hetta vegna flokk okkara fyri sløkum ári síðani. Løgtingsmál no. 143/2008.

Har varð mælt til at broyta stýrisskipanina soleiðis, at tingmanntalið skal lækkast úr 33 niður á 25 tingmenn, og at ásetingin um manning av landsstýri skal orðast soleiðis, at vera skal ein løgmaður og í minsta lagi tveir og í mesta lagi seks landsstýrismenn. Soleiðis slepst við lóg undan ynskidreymunum hjá diverse persónum og flokkum, táið landsstýri skulu skipast, umsitingin minkar og gerst heilt víst munadyggari og rationellari fyri tey, sum umsitingin er skipað fyri at tæna, og hol er tá sett á eina neyðuga trimming av almenna geiranum, ið hevur vaksið seg til hálva dráttin í samlaða føroyska samfelagsgeiranum.

Flokkarnir hjá teimum trimum, sum í oddagreinini sigast vera eldhugaðir fyri at gera omanfyrinevndu broytingar, vóru ikki sinnaðir at fremja broytingarnar. Havast skal í huga, at tveir teirra eru floksformenn og ein næstformaður, og táið atkvøtt var um uppskot okkara dagin fyri flaggdagin í fjør, tá atkvøddu bara umboð fyri Tjóðveldi fyri uppskotinum, ímeðan allir hinir flokkarnir atkvøddu ímóti tí, sum teir nú uppá hvamsvís siga seg at taka undir við.

Sic transit gloria mundi – soleiðis týnist heimsins skart.

